Álit

í

løgtingsmáli nr. 82/2020: Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um skatt av reiðarívirksemi (Tonsaskattalógin) (Nágreiningar og konsekvensbroytingar)

Landsstýrismaðurin í fíggjarmálum, Jørgen Niclasen, hevur lagt málið fram 10. februar 2021 og eftir 1. viðgerð 16. februar 2021, er tað beint Fíggjarnevndini.

Nevndin hevur viðgjørt málið á fundi 8. mars 2021.

Undir viðgerðini hevur nevndin havt fund við landsstýrismannin í fíggjarmálum, Jørgen Niclasen, saman við TAKS.

Ein samd nevnd hevur hesar viðmerkingar:

Við uppskotinum verða tvær broytingar gjørdar í tonsaskattalógini.

Fyrra broytingin snýr seg um at nágreina, at tað bert eru time-chartraði skip, ið ikki eru skrásett í eini føroyskari skipan, sum einans kunnu verða í skipanini í upp til 2 mánaðir.

Fyri lítlum ári síðani varð tonsaskattalógin broytt. Áðrenn hesa broyting vóru langtíðar time-chartraði skip fevnd av tonsaskattaskipanini, meðan stutttíðar time-chartraði skip ikki vóru tað. Ætlanin við lógarbroytingini tá var, at eisini stutttíðar time-chartraði skip skuldu verða fevnd av lógini í "upp til 2 mánaðir". Við lógarbroytingini varð tí "upp til 2 mánaðir" lagt aftrat orðingini í § 4, stk. 1, nr. 3, men hetta bar eisini við sær, at reiðarí frameftir ikki kunnu langtíðar time-chartra skip millum feløg í sama samtaki og framhaldandi vera fevnd av tonsaskattaskipanini. Hendan avleiðing var ótilætlað, og tí er neyðugt aftur nú at broyta § 4 í løgtingslógini, soleiðis at loyvi aftur verður at langtíðar time-chartra skip eins og ætlanin eisini upprunaliga var.

Seinna broytingin snýr seg um at konsekvensrætta áseting um grannskoðaraváttan. Í galdandi lóg vísir § 19 til § 4 stk. 2 í staðin fyri § 4, stk. 3. Hetta verður rættað við hesum lógaruppskotinum.

Við hesum viðmerkingum tekur ein samd nevnd undir við málinum og mælir Løgtinginum til at samtykkja uppskotið.

Fíggjarnevndin, 11. mars 2021

Magnus Rasmussen formaður	Aksel V. Johannesen næstformaður	Jákup Mikkelsen
Bill Justinussen	Kristin Michelsen	Páll á Reynatúgvu
	Ruth Vang	